# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# FØROYA TELE CUP 2011



Føroya Tele Cup - føroyameistarakapping í GoKart - verður á økinum uttan fyri hjá Føroya Tele í Hoyvík í tíðarskeiðunum 21.- 22. mai og 28.- 29. mai 2011.

Firmakappingin verður skipað við einum innleiðandi umfari, og síðan eini kapping um meistaraheitið. Ferðasteyp verður latið til vinnandi fyritøkuna. Hetta ferðasteyp kann einans ognast eftir at sama fyritøka hevur vunnið føroymeistaraheitið 3 ár á rað ella 5 ár samanlagt. Tvey ár á rað hevur MB Bussar í Havn vunnið kappingina.

Stórur áhugi er fyri kappingini, sigur Agnar Dahl frá AD-Import í RC Effersøesgøtu, sum skipar fyri kappingini. Meira upplýsingar á www.ad-import.fo

# Koyrt jørðina runt




Donsku hjúnini Hjalte Tin og Nina Rasmussen, sum vitjaðu í Føroyum fyri tveimum árum síðan, tá tey m.a. hildu fyrilestur í Norðurlandahúsinum um teirra ævintýrkenda lív á motorsúkklu, eru júst nú afturkomin til Danmark eftir at hava koyrt jørðina runt í einum Nissan Qashqai elbili. Á ferðini kring heimin vitjaðu tey m.a. á heimsframsýningini EXPO 2010 í Shanghai í Kina, á bilaframsýningini í Detroit og luttóku í kappkoyring fyri elbilar í Monte Carlo.

## Hósdagin kl. 16.10

Í sendingini er ein samrøða við Agnar Dahl frá AD Import um Føroya Tele Cup 2011. Samrøða er við donsku hjúnini Hjalta Tin og Ninu Rasmussen, sum vitjaðu í Føroyum fyri tveimum árum síðan, og við Finn Jespersen, sum legði ferðina í Føroyum til rættis. Eisini er ein samrøða við Hans Egil Joensen á Eiði, sum hevur havt lastbilakoyring í yvir 50 ár.



Agnar Dahl




Hjalte og Nina

Vínnu- & bílradío á Rás 2